

Myndir: *Álvur Haraldsen*

# Fim í leiki

Um vikuskiftið hevði Havnar Fimleikafelag sínar árligu framsýningar í høllini á Hálsi, har bæði tey smæstu og tey elstu vístu fram sýni bestu kynstur.

Lagt var fyri fyrrapartin leygardagin klokkan 10, tá smábørn upp til seks ára aldur vóru á gólvinum, og eftir miðdag, klokkan 13.30, vóru tað so børnini frá 1. til og við 3. flokk, ið vóru á skránni. Og seinnapartin klokkan 17 vóru tað so tey frá 4. til og við 6. flokk, sum sluppu framat. Mánakvøldið klokkan 19 var so fjórða og seinasta framsýningin, ið fevndi um vaksin, frá 7. flokki og eldri.

Allar sýningarnar endaðu við handan av 5, 10 og 15 ára nálum og ídnisprógvum.

Her eru nakrar av myndunum, sum Álvur Haraldsen tók í høllini á Hálsi leygardagin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*












